LM-099/2023

Fylgiskjal 73

klaksvíkar kommuna
Postboks 2
FO-710 KLAKSVÍK
FØROYAR
e-mail: klaksvik@klaksvik.fo
Telefon (+298) 410000

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Tinganes
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn

24/00264-2

Klaksvík. 23. februar 2024

Hoyringarskriv frá Klaksvíkar kommunu um lóg um burðardygga ferðavinnu

Hetta hoyringarskriv er grundað á umroður í teimum staðbundnu nevndunum í Klaksvíkar kommunu, felags fundi millum kommunustýrislimir í Norðoyggjum (hildin 16. februar), skriv frá staðbundnu nevndunum í Kalsoynni og innanhýsis viðgerð í Klaksvíkar kommunu. Viðfest hesum skrivi er skriv frá øllum staðbundnu nevndunum í Kalsoynni, stílað til borgarstjóran.

Hoyringartíðarskeiðið, ein mánaður, hevur verið ov stutt. Tað er ov lítil tíð til at viðmerkja eitt so stórt, umstrítt og týðandi mál.

Tað er eingin loyna, at stóri vóksturin í talinum á ferðafólkum í Føroyum seinastu tíggju árini hevur verið við til at skapt inntókur og storv, men eisini fort til avbjóðingar á fleiri økjum, eittnú um rættindi, gjald, ábyrgdir og gongd í haga. Tí er gott og neyðugt, at landsstýrið ætlar at skipa grundleggjandi viðurskifti.

Heitið á lógaruppskotinum
Heitið á lógaruppskotinum er *logtingslóg um burðardygga ferðavinnu*. Sæð í mun til innihaldið í lógaruppskotinum elvir heitið til undran, tí kjarnin í uppskotinum er gongd í haga, ásetingar um farleiðir, náttúrugjald, ferðavinnuætlan v.m. Heitið *gongd í haga* hava flest oll vant seg við, og uppskotið er ein roynd frá landsstýrismanninum í uttanríkis- og vinnumálum at skipa nokur grundleggjandi viðurskifti um gongd, atferð og skipan í haga. Tí er heitið *lógaruppskot um gongd í haga* eitt betri heiti enn *lógaruppskot um burðardygga ferðavinnu*. Eisini kann viðmerkjast, at innihaldsliga er í stóran mun talan um regulering, sum fær avleiðing fyri jarðar- og hagalóggávuna, sum er gomul serlóggáva, sum bleiv fyrireikað serliga væl eftir føroyskum standardi tá. Tá eru fleiri serlig atlit at taka til tað lógarverkið, og áttu umfatandi broytingarnar ella avleiðingarnar, sum hetta uppskotið hevur við sær fyri jarðareigarar, av rættum at verið viðgjordar og síðan reguleraðar í hagalóggávuni o.l., heldur enn í einum hami av ferðavinnulóggávu. Tá kundi hóskandi verið tikið meira og neyðuga atliti til mentanarlig viðurskifti, siðvenju og ognarrættarlig viðurskifti hjá jarðareigarunum, sum ikki sæst serliga nógv til í uppskotinum.

Ov nógvar heimildir í kunngerð
Í hesum uppskoti verða alt ov nógvar heimildir veittar landsstýrismanninum. Í lógar- og politikksmiði eigur málið at vera at skipa grundleggjandi viðurskifti í lóg í so stóran mun, sum til ber, og í aðru atlogu í kunngerð, og tá skulu kunngerðarheimildir verða ásettar so neyvt sum møguligt, og innan fyri lógarheimildina.[1] Í uppskotinum fær landsstýrismaðurin hesar heimildir:

[1] Í *Rundskrivi um lógarsmið*, sum Logmansskrivstovan gav út í 2019, er m.a. hetta viðmerkt um kunngerðir (s. 48): Hóast ein heimild í logtingslóg kann vera heilt víð, so eiga grundleggjandi reglur ikki at ásetast í kunngerð, tí hetta er ikki í tráð við § 34, 1. pkt. í stýrisskipanarlóg Føroya. Kunngerðir kunnu sostatt bert nágreina tað, sum longu er ásett í logtingslógini. Ásetingar um grundleggjandi reglur fyri borgaran, vinnuliv o.o. skulu standa í logtingslógini.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 · FO-700 Klaksvík · Foroyar · Tlf. 410000

- Gera standardavtalur (grein 5, stk. 3)
- Ferðavinnuætlan góðkennast (grein 6, stk. 3)
- Krøv til ferðaleiðarar (grein 6, stk. 4)
- Skipan av farleiðum (grein 8, stk. 2)
- Góðkenna skilhaldsreglur (grein 9, stk. 3)
- Reglur um ferðslu í vandamiklum økjum (grein 11, stk. 1)
- Steingja heilt ella luvíst vandamikil øki (grein 11, stk. 2)
- Góðkenna avmarkingar av ferðslu (grein 12, stk. 4)
- Ásetur upphædd á náttúrugjaldi (grein 13, stk. 2)
- Áseting av inntøkubýti millum partarnar (grein 14, stk 5)
- Áleggja tí, sum hevur ábyrgdina, at fáa aftur í rættlag ella steðga viðurskiftum (grein 15, stk. 1)
- Tað álagda verður framt fyri eigarans ella brúkarans rokning (grein 15, stk 2)

Hesin listi vísir greitt mongu og fjølbroyttu heimildirnar, ið landsstýrismaðurin fær við hesari lóg. Skipan av hesum viðurskiftum átti at verið heimilað í sjálvari lógini. Sama er galdandi fyri grein 2, stk. 2, har tað uttan víðari nágreining verður lagt til landsstýrismannin at taka avgerð fyri eigarar, brúkarar og onnur um allar allýsingar. Tað er ikki sort víttgangandi.

Ábyrgdarbýti

Vit vita av ringum royndum, hvussu illa tað mangan roynist, tá ið eitt málsoki verður umsitið av bæði landi og kommununum á henda hátt, at kommunurnar í veruleikanum skulu hava alla ábyrgd og alla uppgávuna av at menna, skipa, byggja, rokja, umvæla og fíggja ferðavinnuátokini í egnari kommunu. Skal hetta okið mennast, krevur hetta, at kommunurnar fáa fulla ábyrgd og heimild av hesum viðurskiftum, og at tær avmarkingar, sum skulu gerast, verða feldar í sjálva lóggávuna, sum Foroya Logting samtykkir.

Ein slík skipan er sera tung at umsita við nógvum skrivligum samskifti millum tveir sjálvstoðugar sektorar, sum vanliga ikki arbeiða saman so tætt, og sum vanliga virkar best við einum greiðum, atskildum uppgávu- og ábyrgdarbýti.

Eisini hevur avleiðingin av tvíbýttari ábyrgd, sum her verður lagt upp til, víst seg at enda við, at hvorgin parturin tekur ábyrgd, sum er tað ringasta, ið kann henda fyri hetta málsokið.

Gylta reglan fyri fíggjarliga býtið millum land og kommunur hevur hesi seinastu áratíggjuni verið, at tá uppgávur flyta t.d. frá landinum til kommunurnar, verður landsskatturin lækkaður og kommunuskatturin hækkaður samsvarandi kostnaðinum av viðkomandi uppgávum. Hetta so fíggjarliga býtið eisini verður greitt og púra atskilt. Henda aðalregla verður als ikki fylgd í hesum uppskoti.

Her vilja vit staðiliga mæla til greiðan skilnað í uppgávu- og ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur, sum verður staðfestur í sjálvari lógini.

Standardavtala (grein 5)

Ásett er, at landsstýrimaðurin skal gera eina standardavtalu í samband við handilsliga ferðavinnu (grein 5). Hvat er endamálið við slíkari avtalu, og hvat skal hon innihalda? Viðurskifti í slíkari standardavtalu áttu at verið skipað beinleiðis í lóg, tí tað tykist, sum grundleggjandi krov og viðurskifti skulu regulerast við atliti at handilsligari ferðavinnu. Og havast skal í huga, at viðurskiftini kunnu vera rættiliga ymisk frá einum stað til eitt annað.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 · FO-700 Klaksvík · Foroyar · Tlf. 410000

Ferðavinnuætlan (grein 6)
Metingin hjá Klaksvíkar kommunu er, at náttúruverndargjaldið er alt ov lágt til at fíggja uppgávurnar, sum lagdar verða á kommunurnar.

Fyri kommunur eru ásetingar í grein 6 um ferðavinnuætlan rættiliga umfatandi og leggja stórar skyldur og uppgávur á kommunur. Uppgávan at gera eina ferðavinnuætlan verður sera orku- og tíðarkrevjandi. Uppskotið leiðir til sera nógva umsiting og til væntandi nógv samskifti við hópin av áhugapørtum.

Sambært lógaruppskotinum fáa kommunurnar helvtina av náttúrugjaldinum. Á fundi í Klaksvík hin 16. februar vísti landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum á dømi, har parturin hjá kommunum av náttúrugjaldinum var 10 mió. kr. Eftir hesum leisti hevði parturin hjá Klaksvíkar kommunu verið á leið 500.000 kr. Hetta er ein sera lág upphædd við atliti at teimum skyldum, sum lógaruppskotið leggur á kommununa. Henda upphædd rokkur als ikki til tað arbeiðið, sum kommunan skal gera. Rokkur peningurin til at rokja allar bygdagøturnar og til at gera nýggjar farleiðir/gøtur? Svarið er greitt nei.

Viðmerkjast skal, at sambært uppskotinum er náttúrugjaldið markað til at halda og gera gøtur og onnur átok (grein 14, stk. 2), og sostatt verður ikki lagt upp til, at ferðavinnugjaldið skal brúkast til at gera ferðuvinnuætlan, sum er eitt kostnaðarmikið og umfatandi arbeiði. Niðurstoðan er púra greið: penignurin rokkur als ikki til álogdu lógarskyldurnar.

Aðrar gøtur (grein 6 og 8)
Tað er ógreitt, hvussu ein kommuna skal skipa nýggjar farleiðir. Hvor skal gera av, hvar nýggjar farleiðir skulu skipast? Hvussu er stoðan, um eigari ikki ynskir nýggjar leiðir í sínum haga? Er tað rímiligt, at kommunan sjálv skal bera allan kostnaðin? Tað kann vera sera kostnaðarmikið at gera nýggjar farleiðir.

Umsiting av pengum (grein 7 og 14)
Tað undrar, at heimafólkið (bygdafólkið), staðbundnar nevndir, skal umsita pengar, sum koma frá náttúrurgjaldinum (grein 7). Fyrsta viðmerking er, at tað er greitt ein uppgáva hjá kommununi at umsita slíkan pening. Onnur viðmerking er, at tað hevði verið umsitingartungt at skipa peningaumsiting úti í bygdunum.

Náttúrugjald og kommunupartur (grein 14)
Sum nevnt omanfyri, er parturin hjá kommunum av náttúrugjaldinum alt ov lítil í mun til skyldurnar, sum lógaruppskotið leggur á kommunurnar.

Ferðavinna og nærfólkaræði
Hvussu er stoðan, tá ið jarðareigarar ella heimafólk ikki ynskja at hava vinnuligt ferðavinnuvirksemi í teirra oki/hagum? Skal kommunan skipa ferðavinnu, har greitt ynski er ikki at hava ferðavinnuvirksemi? Tað hevði verið í stríð við nærfólkaræðisliga hugsan.

Leiklutur hjá Visit Faroe Islands?
Tað er logið, at eitt lógaruppskot, sum ber heitið *lóg um burðardygga ferðavinnu* ikki nevnir Visit Faroe Islands við einum orði. Hvor er leiklutin hjá VFS? Hvar er sambandið millum lógaruppskotið og *ferðavinnustrategiina fram ímóti 2030* hjá VFS, har hovuðsmálið er: *Mál okkara er, at í 2030 hevur ferðavinnan gjort Foroyar, heimland okkara, til eitt betri samfelag sosialt, búskaparliga og umhvørvisliga*?[2] Hvønn leiklut hevur eindin í VFS, sum hevur innlendis ferðavinnusamskipan sum ábyrgdaroki?

[2] https://visitfaroeislands.com/fo/ferdavinna-um-okkum-endamalid-ferdavinnustrategi-2030

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 · FO-700 Klaksvík · Foroyar · Tlf. 410000

Sjónarmið hjá staðbundnu nevndunum í Kalsoynni
Í Klaksvíkar kommunu er føst skipan við staðbundnum nevndum, sum geva ráð og tilmæli til Klaksvíkar Býráð og býráðsnevndir. Nevnast kann, at Visit Norðoy hevur havt borgarafundir í Kalsoynni og Kunoynni, har teir staðbundnu íbúgvarnir hava sagt sína hugsan um, hvussu gongd í haga kann skipast, og hava fundirnir givið virðismikil íkøst.
Nevndirnar í Kalsoynni hava skrivað eitt drúgt og væl grundgivið hoyringarskriv, sum Klaksvíkar kommuna tekur í størsta álvara, og okkara tilmæli til Uttanríkis- og vinnumálaráðið er at lesa væl og gjølla nevndu viðmerkingar, sum spretta úr einum oyggjasamfelagi, sum ynskir skipað viðurkskifti og vernd av grundleggjandi rættindum, og ikki minst virðing frá landsstýrisins síðu.

Í skrivinum siga nevndirnar m.a.:

> *"Vit eru sera horm um fólkaræðisligu tilgongdina í hesum fyri bygdirnar so týðandi máli. Tað tykist, sum uppskotið er skrivað fjart frá okkum, ið dagliga búleikast og virka í Kalsoynni. Eingin – hvorki landsstýrismaðurin ella embætisfólk hansara hava okkum vitandi nýliga verið í oynni at gera seg kunnugan við avbjóðingar á staðnum.*
> *Nevndu hava, okkum vitandi, hvorki munnliga ella skrivliga vent sær til nakran viðkomandi part í oynni við fyrispurningum hesum viðvíkjandi, áðrenn kjolurin varð strektur til fyriliggjandi uppskot.*
> *Tað sýnist, sum um málið verður smoygt omanyvir kommunur, bygdafólk, jarðareiðarar, bóndur o.o., uttan at tey hava verið hoyrd frá byrjan. Tí kennist uppskotið fremmant og uttan kjolfesti í lokalsamfelagnum, har avleiðingarnar av uppskotinum við tíðini fara at kennast beiskast, og gera størstan skaða."*

Samanumtikð er boðskapurin í nevnda skrivi, at lógaruppskotið tekur ikki atlit at staðbundnu viðurskiftunum og ynskjunum, sosialari burðardygd og jarðarrættindum, og at uppskotið er torskilt og leggur stórar skyldur á kommunu og staðbundu nevndirnar. Ein týðandi atfinning í skrivinum er, at lógin ikki stuðlar upp undir lokala ferðavinnu og inntokumoguleikar.

Mælt verður til, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið kemur beinleiðis á tal við staðbundu íbúgvarnar í Kalsoynni.[3] áðrenn farið verður víðari við lógaruppskotinum.

Samanumtoka
Sum áður nevnt er gott, at roynt verður at skipa neyðug viðurskifti í gongd í haga.

Málið um gongd í haga er eitt mál, sum tykist vera ógvuliga trupult hjá skiftandi landsstýrum at handfara. Við hesum lógaruppskoti er lætt at koma til ta niðurstoðu, at kommununar skulu loysa tað, sum landið ikki megnar. Tað tykist, sum landið spælir bóltin til kommununar, men vil tó framvegis stýra og hava avgerandi vald við víðum kunngerðarheimildum hjá landsstýrismanninum.

Samanumtikið er niðurstoðan, at lógaruppskotið leggur alt ov stórar skyldur á kommununa, inntokurparturin hjá kommunu er alt ov lítil, landsstýrismaðurin fær alt ov stórar heimildir, og nógvir ósvaraðir spurningur eru og ógreið viðurskifti við. Lógaruppskotið hevur ikki kjolfesti í lokalsamfelogum, har ferðavinnan í stóran mun setir sín dám.

[3] Landsstýrismaðurin hevur á síni rundferð kring landið í seinastuni eisini havt kunningarfund fyri kalsoyingum, men hetta eftir at hoyringarskrivið kom frá kalsoyingum.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 · FO-700 Klaksvík · Føroyar · Tlf. 410000

Eitt slíkt víttfevnt lógaruppskot, ið hevur so stóra ávirkan á kommunu, jarðareigarar, bøndur, vinnu borgarar og bygdir átti at verið nógv greiðari. Allir áhugapartarnir áttu at verið tiknir við í fyrireikandi lógararbeiðið. Sannlíkt hevði lógaruppskotið tá verið betri, greiðari og meira semjusøkjandi.

Hetta tingárið er farið at halla, og tíðin er rættiliga avmarkað til at geva lógaruppskotinum eina noktandi viðgerð í landsstýrinum og Løgtinginum. Mælt verður til, at Uttanríkis- og vinnumálararáðið gevur sær góða tíð at viðgera tey sera nógvu hoyringarskrivini, ið kunnu væntast at koma til uppskotið. Mælt verður til, at lógaruppskot, í munandi broyttum og bøttum líki, verður heldur lagt fram í komandi tingsetu.

Vinaliga

Karl H. Johansen, borgarstjóri

Rúni Rasmussen, kommunustjóri

Fylgiskriv: Skriv frá staðbundnu nevndunum í Kalsoynni

Hoyringssvar til løgtingslóguppskot um burðardygga ferðavinnu.

Staðbundnu nevndirnar í Kalsoynni, ein fyri hvørja bygd, hava fingið lógaruppskot um burðardygga ferðavinnu til hoyringar frá Klaksvíkar Kommunu, og eru bidnar um at gera hoyringssvar í felag.

Staðbundnu nevndirnar hava í felag hesar viðmerkingar:

Lógarteksturin endurspeglar ikki yvirskipaðu ætlanirnar

Yvirskipaðu ætlarnirnar við uppskotinum tykjast í fyrstu syftu góðar. Lagt verður upp til at skipa ferðavinnuna burðardgt. og í almennu viðmerkingunum verður greitt frá ætlanunum um burðardygd, lokalan avgerðarrætt og vinnumoguleikar í útjaðaranum við háfloygdum jaligum orðingum.

Men tá lisið verður í lógartekstinum, og í serligu viðmerkingunum, við brillunum hjá einum uttanfyri miðstaðarøki, sum fæst við jørð, ella ferðavinnu, - fær ein sum vátan vottin.

Tað tykist, sum yvirskipaðu ætlanirnar als ikki speglast aftur í lógartekstinum. Lógarteksturin kundi tað sama verið skrivaður á aðrari gongustjørnu, fjart frá okkara sólskipan.

Nógvar av avbjóðingunum, sum lógin lýsir eru annaðhvørt ikki til, ella í besta fori íspunnir av onkrum, sum ikki kennir til gerandisdagin á bygd, - jarðarbrúk ella ferðavinnu í útjaðaranum.

Vit eru sera horm um, at ein lóg um burðadygga ferðavinnu ger so stór og óheppin inntriv í landbúnaðin, sum er týðandi vinna og mentanarligur siðaarvur í oynni.

Tí mæla vit frá at tíðandi greinar í jarðarlóggávuni frá 1937 verða strikaðar til frama fyri ferðavinnufyritokur og felagskapir á meginlandinum, sum eftir lógarbroytingarnar kunnu hóreiggja sær, nærmast sum tær vilja í hagaportunum í oynni.

Vit rokna við, at tey, ið fáast við hotellvirksemi í miðstaðarokinum, ferðavinnuskrivstovur, ferðavinnufelog og VFI fegnast almikið um uppskotið. Í hvussu er, verða fleiri av teimum rættindum, sum í dag liggja úti um landið, í bygdunum og hjá landbúnaðinum flutt úr útjaðaranum til tað almenna og nevndu aktorar á meginlandinum. Kommunurnar skulu sambært lógaruppskotinum rudda slóð fyri hesum.

Tá soleiðis er, ber okkum ikki til at tala fyri lógaruppskotinum. Javnvágin millum okkum á bygd, samanborið við tey á meginlandinum er ikki til staðar. Tí manglar fólkalívsfroðiliga og sosiala burðardygdin í uppskotinum.

Vit mæla tí Klaksvíkar kommunu til, at mæla Kommunufelagnum til at grundgeva fyri, at lógaruppskotið eigur at verða tikið aftur.

Skal nýggj lóg gerast á okinum, eiga bygdirnar og tey, ið varða av jørðini at vera tikin við í lógarsmíðið frá byrjan.

Umfatandi uppgávur út til kommunurnar

Í okkara eygum er uppskotið ikki gott fyri bygdirnar í Kalsoynni, og tað leggur bæði fíggjarliga - og umsitingarliga umfatandi uppgávur út á kommunurnar. Millum annað skulu kommunurnar velja nevnd at skipa ferðavinnuna í okinum. Nevndin skal eisini býta pening út til bygdir og hagar.

Komunnurnar skulu eisini viðlíkahalda gamlar gøtur í haganum, og gera nýggjar gøtur, sum ferðafólkini skulu ganga eftir. Hetta verður gjørt, so útlendsk ferðafólk kunnu ganga frítt og ómakaleyst í øllum hagapørtunum í kommununi.

Hentan rættin keypa ferðafólkini frá landinum við at gjalda 150 krónur í sonenvdum náttúrugjaldi. Náttúrugjaldið verður kravt inn sentralt av myndugleikunum í Havn. Roknað verður við, at gjaldið um nøkur ár fer at geva 21,5 mió. kr. tilsamans.

Fyrstu 1,5 mió. kr. fara til sentrala umsiting (2 almenn størv í miðstaðarøkinum), og restin, 20 mió. kr. verður býtt í trý. Helvtin til kommunurnar, ein fjórðingur til bygdirnar og ein fjórðingur til hagarnar.

Hendan skipanin tykist í okkara eygum sera torgreidd, og lítið umhugsað.

Vit skjóta upp, at lokalir ferðavinnuaktørar, sum nú, kunnu krevja peningin inn á staðnum. Royndirnar vísa, at tað gevur inntøkur í oynni, sum skapa arbeiði í lokaløkinum, umframt pening til at gera ábøtur í náttúruni, við at gera gøtur, og at útbyggja ferðavinnutilboðini í oynni uppaftur meir.

Burðardygd

Vert er at seta spurningin um ferðavinna í Føroyum kann vera burðardygg? Tað er í hvussu er, til eina og hvørja tíð burðardyggari fyri umhvørvið og náttúruna at sita heima, heldur enn at fara langa leið at ferðast.

Skalt tú uttan úr heimi á Klettarnar, kanst tú koma í flogfari ella við ferðamannaskipi. Mátturin til framtokumegi hjá nevndu flutningsførðum stavar frá olju.

Hotellini eru bygd úr innfluttum tilfari, matur og drekka, borðreitt verður við, er fyri tað nógva innflutt, og stórur partur av arbeiðsmegini á hotellunum er útlendsk.

Talan kann tí ikki verða um umhvørvisliga burðardygd, tá um ferðavinnu ræður.

Annar spurningur er sjálvandi um vit vilja hava ferðavinnu, fyri at skapa virksemi og vinna landinum pening. Tá er ein fyritreyt, at hugsað verður fram í tíð og uttanum hópferðavinnu, sum fyriliggjandi uppskot eftir okkara hugsan leggur upp til.

Tað hevur stóran týdning at lurtað verður eftir útjaðaranum, tá um ferðavinnu ræður. Fleiri av grannalondum okkara hava longu brent seg í ferðavinnuhopi, har útjaðaraoki í londunum eru vorðin nógv órógvað, men lítið og einki fingið burturúr peningaliga.

Vit hava hug at spyrja, hví vit í Føroyum skulu gera sama feilin umaftur, sum hini longu hava gjørt?

Føroyingar ferðast frítt í haganum

Tað munnu vera tey fægstu, sum hava nakað ímóti, at einstakir føroyingar ferðast frítt og uttan gjald í haganum, um væl verður farið um, og atlit verða tikin til annað virksemi. Men vit meina ikki, at tað er rætt at viðgera tann spurningin í lógini um burðadygga ferðavinnu.

Vit meina, at tað heldur ikki er rætt at venda siðvenjuni, sum í dag er galdandi á høvdi, soleiðis, at tað nú vera tey, ið varða av jørðini, sum skulu boða frá, at farið verður á fjall ella at skjóta haru. Tað eiga at vera "gestirnir" sum skulu boða frá.

Tá stórir bólkar fara í hagan, og tá talan er um vinnuliga gongd í haganum, eiga viðurskiftini sjálvsagt at vera neyvt skipað í samráð við tey, sum eiga ella varða av jørðini. Heldur ikki hendan avbjóðing eigur at skipast í lógini um burðardygga ferðavinnu.

Her eiga góðar loysnir at finnast, uttan at flyta fleiri av lunnindinum, sum í dag liggja á bygd í bý.

Okkara royndir eru, at nevndu avbjóðingar eru minkaðar munandi seinastu árini. Sonevndu gongufelogini hava altíð boðað frá, tá tey fara í hagan. Tey biða eisini um lokalar ferðaleiðarar. Harumframt hava mest sum allir ferðaleiðarar, sum reka vinnuliga ferðavinnu í hagportum hjá oðrum, nú gjort avtalur við eigarar og bóndur.

Alt hetta er gjort í sátt og semju millum jarðareigarar/bóndur og ferðaleiðarar.

Hørm um fólkaroðisligu tilgongdina.

Vit eru sera hørm um fólkaræðisligu tilgongdina í hesum fyri bygdirnar so týðandi máli. Tað tykist, sum uppskotið er skrivað fjart frá okkum, ið dagliga búleikast og virka í Kalsoynni.

Eingin – hvorki landsstýrismaðurin ella embætisfólk hansara hava okkum vitandi nýliga verið í oynni at gera seg kunnugan við avbjóðingar á staðnum.

Nevndu hava okkum vitandi, hvorki munnliga ella skrivliga vent sær til nakran viðkomandi part í oynni við fyrispurningum hesum viðvíkjandi, áðrenn kjolurin varð strektur til fyriliggjandi uppskot.

Tað sýnist sum um málið verður smoygt omanyvir kommunur, bygdafólk, jarðareiðarar, bóndur o.o., uttan, at tey hava verið hoyrd frá byrjan.

Tí kennist uppskotið fremmant og uttan kjolfestið í lokalsamfelagnum, har avleiðingarnar av uppskotinum við tíðini fara at kennast beiskast, og gera størstan skaða.

Ferðavinnan í Kalsoynni

Tá VFI fór at marknaðarfora Foroyar, sum ferðavinnuland fór talið av ferðandi í Kalsoynna at okjast, og undir koronufarsóttini fóru foroyingar í stórum tali at ferðast í egnum landi. Hetta merktist eisini í Kalsoynni.

Í byrjanini vóru viðurskiftini í oynni óskipað. Orsokin til hetta var, at myndugleikarnir hovdu ikki givið sær far um, at ferðafólk, sum koma til Foroyar ynskja at koma út um landið at síggja bygdirnar, hagan, fjollini og djóralívið.

Útjaðarin var tí ikki fyrireikaður til stóru broytingarnar nógvu ferðafólkini hovdu á lokalsamfelagið. Harumframt var útjaðarin ovfarin av, hvussu lítið ferðafólkini logdu eftir seg av peningi í bygdunum. Allur vinningur fall, at vísa seg, niður í miðstaðarokinum.

Men við tíðini eru fólk í oynni farin undir at royna at fáa skil á stóru ferðsluni, og at uppbyggja tilboð og tænastur til tey ferðandi. Hetta er gjørt, bæði fyri at skipa ferðavinnuna, og fyri at skapa grundarlag fyri vinnuvegum innan hesa skjótt vaksandi vinnu í lokaløkinum.

Við hjálp frá Klaksvíkar Kommunu og privatum veitarum eru bussrutur skipaðar fyri at avmarka talið av akførum sum koma í oynna við strandfaraskipinum Sam. Parkeringsøki er gjørt á Trøllanesi, soleiðis, at nógva ferðslan órógvar bygdafólkið sum minst. Fólk í oynni eru farin undir at veita áhugaverd ferðavinnutilboð til vitjandi, bæði føroyingar og útlendingar.

Vinnuligir ferðasmiðir hava eisini gjørt avtalur við jarðareigarar og bóndur um atgongd til at gera túrar til áhugaverd og vøkur støð í haganum.

Arbeitt verður eisini lokalt við lutfalsliga stórum verkætlanum, at gera gøtur til mest vitjaðu støðini fyri at verja náttúruna í móti sliti, sum kann gerast ógvusligt, um ferðavinnan er óskipað. Gøturnar verða eisini gjørdar fyri at trygdin hjá teimum ferðandi skal vera so góð sum gjørligt.

Ferðavinnan í Kalsoynni er tí nógv betur skipað í dag, enn hon fyrr hevur verið. Hetta hevur verið gjørt uttan nakra serliga hjálp frá myndugleikunum í Tinganesi, sum nú hava sent lógaruppskot til hoyringar, og sum eftir okkara meting, er við til at taka eggjanina, sum liggur í ferðavinnuni úr lokalsamfelagnum, og flyta hana fult og heilt til hotelleigarar og ferðasmiðir í miðstaðarokinum.

Vandi er eisini fyri at útlendskar ferðavinnufyritokur, fara at leypa føroyskar veitarar um bukk, og sjálvir skúma vinningin við fráferð úr heimlandi á Klettarnar og aftur til heimlandið.

Í Kalsoynni ganga føroyingar frítt og uttan gjald í ollum hagaportum. Okkum dámar tó best um boðað verður frá, áðrenn farið verður í hagan. Tað hevur verið siðvenja í oynni, tað vit vita um, og hevur tað okt um trygdina, at fólk á staðnum, ið varða av haganum vita, hvør er í haganum. Um boðað verður frá, áðrenn farið verður, ber eisini til at fyribyrgja órógvi í sambandi við fjallgongu, haruskjóting, lembing o.a., sum fer fram í haganum.

Vit eru tó samd um, at tað er í lagi, at bóndur og jarðareigarar krevja hóskandi upphædd frá útlendingum, sum fara í mest vitjaðu hagarnar.

Kravdi peningurin peningurin verður, sum fyrr nevnt, brúktur til at gera gøtur í haganum, fyri at bota um trygdina hjá ferðandi og fyri at verja náttúruna. Harmframt fer fitt av peningi at lona lokalum ferðaleiðarum og innkrevjarum á staðnum.

Vit meta at figgjarligu avleiðingarnar fyri bygdirnar og lokalar ferðavinnuaktorar í oynni, gerast verri við fyriliggjandi lógaruppskoti, tá peningurin verður kravdur inn sentralt við náttúrugjaldi, og skal deilast út aftur erftir umsitingarligum tungum skipanum, har fleiri partar skulu stríðast um fáu krónurnar.

Tá ferðafólk gjalda við komu, verður hugurin nógv minni at keypa tænastur, eitt nú frá ferðaleiðarum lokalt.

Tá figgjarligu vánirnar gerast verri við uppskotinum, gerast útlitini fyri menning og fólkavokstri eisini verri í oynni. Tí gevurtað ikki meining at seta lógina í gildi.

Skal lóg gerast um ferðavinnu eigur hon eftir okkara meining at viðgera spurningar í viðvíkja útlendskum ferðafólkum. Ein lóg um burðadygga ferðavinnu eigur ikki í stórstan mun at viðgera landbúnaðin og at flyta rættindi og vinnumøguleikar úr útjaðaranum.

Við hesum viðmerkingum mæla vit frá at arbeitt verður víðari, eftir tí leisti, sum lógaruppskotið um burðardygga ferðavinnumleggur upp til.

Staðbundna nevndin á Trøllanesi:

Anja Eliassen Eivindur Eyðunsson Jóhannus Kallsgarð

Staðbundna nevndin í Mikladali:

Dánjal Eliassen Kristian Andreassen Markus í Norðnastovu

Staðbundna nevndin á Húsum:

Elin Syderbo Jákup Samson Sólarn Isaksen

Staðbundna nevndin á Syðradali K.

Paulina M. K. Eliasen Andrias Eliasen Bjorn Kalso